# Løgfrøðingar til Føroya Kærustovn

## Søkt verður eftir 2 løgfrøðingum til Føroya Kærustovn

**Kærustovnurin er skrivstova hjá**
- Kærunevndini í almanna- og heilsumálum
- Skatta- og avgjaldskærunevndini
- Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum
- Lendiskærunevndini
- Vinnukærunevndini og
- Skuldarumskipanarnevndini.

**Høvuðsuppgávurnar hjá løgfrøðingunum vera**
- at lýsa og viðgera kærur frá borgarum og fyritøkum
- at gera nevndunum tilmæli um avgerð
- at hava samskifti við kærarar og stovnar innan kæruøkini
- at luttaka í gerð av ársfrágreiðingum, avgerðarsøvnum og vegleiðingum til stovnar og borgaran

**Førleiki**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv. Kunna arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum um størri arbeiðsuppgávur. Tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir innan almenna fyrisiting og/ella privata arbeiðsmarknaðin sum løgfrøðingur, tó at hetta ikki er eitt krav.

**Vit bjóða**
- spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi og
- góðar skeið– og eftirútbúgvingarmøguleikar

Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Føroya Kærustovnur
Sigmundargøta 13, 2. hædd – Boks 45
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera Føroya Kærustovni í hendi í seinasta lagi á 15. september 2008. Størvini verða at seta frá 1. oktober ella eftir avtalu.

Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við Anju Hovgaard, stjóra, á tlf. 320585 fyri at frætta nærri um starvið.

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Løgmálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Lendiskærunevndina og Vinnukærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivtova hjá Skuldarumskipa narnevndini. Á stovninum starvast í løtuni 8 fólk, stjórin, tríggir løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.



# 2 størv hjá Meginfelag Búnaðarmanna

## Meiaristnæmingur

Meiaristnæmingurin hevur eina lærutíð uppá 3 ár, og er skúlagongdin í Danmørk, 5 ferðir í tíðarskeiðinum, í tilsamans 50 vikur.

Eftir lokna útbúgving er møguleiki at útbúgva seg víðari, til eitt nú meiaríteknikara, processteknolog ella meiaríverkfrøðing.

**Starvstreytir**
Løn samb. sáttmálanum við Handverkarafelagið, og er skúlagongdin í Danmørk ókeypis.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 20. september.

Vilt tú hava meira at vita um útbúgvingina og starvið, so vinarligast set teg í samband við okkum á tel. 309000, og spyr eftir Øyvind.

Eisini ber til at senda ein teldupost til oyvind@mbm.fo

## Pakkioperatørur

Til framleiðsluna søkja vit eftir einum dugnaligum og álítandi fólki til alt pakkiarbeiði. Mjólkarvirkið fær í vetur nýggjar pakkimaskinur, og kemur tú at verða við í uppseting og innkoyring av hesum maskinum. Fólk við tekniskum førleika hava fyrimun.

**Starvstreytir**
Løn samb. sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 1. oktober 2008.

Vilt tú hava meira um starvið, so ring á tel. 309000, og spyr eftir Øyvind.

Eisini ber til at senda ein teldupost til oyvind@mbm.fo

Meginfelag Búnaðarmanna varð stovnað í 1977, 34 fólk starvast hjá fyritøkuni í dag. Høvuðsøkini eru Mjólkarvirki Búnaðarmanna, sum stendur fyri innsavnan og framleiðslu av mjólk og mjólkarúrdráttum, og Búrøkt sum hevur sølu av fóðri og brúkslutum til landbúnaðin um hendi. Harumframt hava vit eisini eina søludeild, ið selir maskinur og eykalutir við hartil hoyrandi maskinverkstaði.

MBM
Vegurin langi · Postboks 3088 · 110 Tórshavn · Tel: 309000